# Bilur við skaða til sølu til hægstbjóðandi

**Merki:** Ford Fiesta Sport 1,3 bensin - 3 hurðar.

**Árg.:** 16.06.1995

**KM:** 76.474

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Mogens Petersen, 826 Trongisvágur.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

tlf. 37 38 90
fax nr. 37 31 17
at hitta millum kl. 08.00-10.00

# Roknskaparleiðari

Søkt verður eftir roknskaparleiðara til Leirvíkar Kommunu at byrja beinanvegin ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðið fevnir um bókføring og fíggjarstýring, umframt vanligt skrivstovuarbeiði.

**Førleiki:**
Útbúgving innan roknskap og/ella hollar royndir frá roknskapararbeiði er ein treyt, eins og kunnleiki til nýtslu av teldu.

**Løn:**
Løn verður goldin sb. sáttmála við avvarandi felag.

**Upplýsingar og umsókn:**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Sjúrð Eliasen, tlf. 443123. Umsókn við avritum av møguligum prógvum skal sendast til Spf Grannskoðarastovuna, 480 Skála, innan 15.2.2000.

**Spf Grannskoðarastovan**
**480 Skála**
**Tlf. 441666**

# Lærlingur søkist

Søkt verður eftir lærlingi til Eykalutagoymslu okkara – at byrja sum skjótast.

Ert tú ágrýtin, nærlagdur/løgd og hevur hug at nema lærdóm í spennandi umhvørvi og í áhugaverdari vinnu við nógvum møguleikum – so send okkum skrivliga umsókn helst ídag.

Partur av útbúgvingini fer fram á donskum skúla, og krevst tískil FHS prógv.

Merk brævbjálvan: **Goymslulærlingur**

**P/F WENZEL**
Box 3043 • 110 Tórshavn
Tlf. 313873 • www.wenzel.fo

Frá
**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

# Limafundur

um politisku støðuna verður

**mánakvøldið kl. 20**

í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta 9.

Løgtingslimirnir Katrin Dahl Jacobsen, Kristian Magnussen, Hendrik Old og Jóannes Eidesgaard verða við á fundinum.

**Nevndin**

# Skeið: Sosialar rørslur

Í vár skipar Søgu- & samfelagsdeildin á Fróðskaparsetrinum fyri einum skeiði í sosialum rørslum. Skeiðið er fyrst og fremst ætlað lesandi, ið eru komin nakað áleiðis í lesnaði við lærdum háskúla, og lidnum kandidatum við áhuga fyri at leggja aftrat vitan síni.

**Lærarar:** Elin Súsanna Jacobsen, ph.d., adjunktur, Jóan Pauli Joensen, professari og Erland Viberg Joensen, ph.d. lesandi.

**Tíð og stað:** Hósdag kl. 14.00-16.00 á Føroyamálsdeildini, V. U. Hammershaimbsgøta 16, Tórshavn, fyrstu ferð 24. februar. 15 dupulttímar tilsamans, ið svara til 1/6 lestrarár ella 10 ECTS.

**Endamálið** við skeiðnum er at viðgera naknar sosialar rørslur í 19. og 20. øld, sum innan fyri ein felags hugmyndafrøðiligan karm hava sum endamál at broyta samfelagið við at ávirka normar og hugburð, og hvørs týdningarmesta tilfeingi er virksemið hjá teim luttakandi.
Undirvísingin byggir á bókmentir, sum lýsa nøkur dømi um tílíkar rørslur út frá relevantum ástøði. Undirvísingin verður ein blanding av fyrilestrum og kollokvium.

**Próvtøka:** Uppgáva og munnlig framløga í sambandi við undirvísingina telja 1/3 av próvtøkukarakterinum. Skeiðið endar við munnligari próvtøku, ið telur 2/3 av endaliga karakterinum.

**Umsóknarfreistin** er 15. februar 2000.

Umsóknarblað fæst við at venda sær til

**Fróðskaparsetur Føroya,**
Søgu- & samfelagsdeildina,
J. C. Svabos gøtu 7,
100 Tórshavn,
tlf. 31 70 09
t-postur: lailae@ssd.fo

*Halt* **sosialin**

# Skip til sølu

| | |
|---|---|
| **Slag av skipi:** | Frystilínubátur |
| **Bygdur/umbygd./longdur:** | 1977-1979-1985-Noregi (sandblástur 1994) |
| **Klassi:** | Norska Skipaeftirlitið |
| **Stødd:** | 37,98x7,53x4,50 m |
| **Høvuðsmaskina:** | Caterpillar 867 HK, 3508 (frá 1994) |
| **Hj. maskinarí:** | 2 x Scania (ávíkavist frá 1996 & 1998) |
| **Lastarúmd:** | 320 cbm |
| **Egningar-maskina:** | Mustad - (frá 1996) - 38.000 húkar |
| **Frystiorka:** | 2 x plátufrystarir - 11 tons/24 tímar |
| **El- & Nav. tól:** | Brúgvin er væl útgjørd við øllum nútímans hentleikum og flestu tólini eru frá 90'ti árunum. Annars er skipið í góðum standi. |
| **Prísur:** | 14,5 mió. NOK. |

— — — — — — — — — — —

| | |
|---|---|
| **Slag av skipi:** | Bulkbátur/sjálvlossari |
| **Bygdur/umbygdur:** | 1973/1987/1996/1998, Týsklandi |
| **BT/NT** | 712/264 |
| **Klassi:** | Norska Skipaeftirlitið klassaður 8/1999 - nýggjan tanktop (18 mm) |
| **Stødd:** | 49,59 x 10,12 x 5,13 m (við farmi) |
| **Lastarúmd:** | 1000 cbm/TDW. umleið 1250/1300 |
| **Høvuðsmaskina:** | Caterpillar 3512TA - 1250 HK (frá 1998) |
| **Síðuskrúu:** | Brunvoll, 250 HK |
| **Gravimaskinan:** | Åkerman H14B (frá 1993) - skuffan 2,5 cbm |
| **Prísur:** | Reiðaríið biður um besta boð. – Skipið sigst vera í sera góðum standi. |

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

TOR SHIPPING

Niels Finsensgøta 23 • Box 1252 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 85 31 • Fax 31 93 69
E-mail torship@post.olivant.fo

Hesar ognir verða lýstar til sølu:

## Hús í Mikladali

Vegna Føroya Skiftirætt verða ognirnar matr. nr. 113 og 103, Mikladalur, sum eru ávikavist sethús og neyst, lýst til sølu, um hóskandi boð fæst.

Føroya Skiftirættur tilskilar sær rætt til at velja millum tilboð, ið koma inn, og til einki at góðtaka.

## Hús í Bringsnagøtu, Tórshavn

Vegna Føroya Skiftirætt verður ognin Bringsnagøta 10 lýst til sølu.

Grundøkið er uml. 110 m²

Húsini eru í tveimum hæddum, uml. 85 m² hvør og treingja til ábøtur.

Føroya Skiftirættur tilskilar sær rætt til at velja millum tilboð, ið koma inn,og til einki at góðtaka.

Nærri fæst at vita um hesar ognir við at venda sær til skrivstovu okkara:

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**



Forskningsstyrelsen
Danish Research Agency

# Post doc.-stipendier

**til fremme af ligestillingen blandt det videnskabelige personale inden for det samfundsvidenskabelige område.**

*Statens Samfundsvidenskabelige Forskningsråd* opslår hermed 5 toårige stipendier på post doc.-niveau til yngre, gerne kvindelige forskere, der har afsluttet en ph.d.-uddannelse. Der sigtes mod ansættelse fra 1. juni 2000 eller snarest muligt herefter, dog senest pr. 1. januar 2001.

Formålet med initiativet er at styrke dansk samfundsvidenskabelig forskning ved at fremme en mere ligelig kønsmæssig fordeling blandt det videnskabelige personale på det samfundsvidenskabelige område. Initiativet vil blive baseret på positiv særbehandling inden for rammerne af ligebehandlingsloven. Forskningsrådet har fået dispensation fra loven til at iværksætte denne aktivitet. Det betyder, at ved bedømmelsen af ansøgninger inden for fagområder, hvor der er beskæftiget færre kvindelige forskere end mandlige forskere, vil ansøgninger fra kvinder blive foretrukket, når der ud fra en konkret vurdering af projekter og ansøgere er tale om lige kvalifikationer. På baggrund heraf opfordres kvinder til at søge.

Stipendiaterne skal tilknyttes allerede eksisterende forsknings- og uddannelsesmiljøer eller sektorforskningsinstitutioner. Ansættelse vil finde sted i henhold til den gældende stillingsstruktur på området.

Der kan både søges om støtte til iværksættelse af nye projekter og til udvidelse/videreførelse af igangværende projekter.

SSF vil fortrinsvis prioritere fagområder, hvor

- kvinderepræsentationen blandt det fastansatte videnskabelige personale er svag,
- der er mange løstansatte kvindelige forskere, og hvor der er ringe mobilitet blandt det fastansatte personale.

Ansøgninger indsendes på Forskningsstyrelsens skema 1 i 16 eksemplarer og stiles til:

Statens Samfundsvidenskabelige Forskningsråd
Randersgade 60
2100 København Ø

Ansøgningerne skal være modtaget senest

**11. april 2000, kl. 12.00**

Vedr. de formelle krav til udformningen af ansøgningen henvises der til SSF's infor-mationsfolder. Informationsfolderen samt ansøgningsskema 1 findes på Forskningsstyrelsens hjemmeside: http://www.forsk.dk.

Ansøgningerne vil blive behandlet på rådets møde den 4. mai 2000.

Rådet skal i øvrigt gøre opmærksom på, at det – jf. rådets informationsfolder – vil være muligt at indsende ansøgninger om post doc.-stipendier til rådets ordinære uddelingsmøder (ansøgningsfrister 1. marts og 1. oktober).

Yderligere oplysninger kan fås ved henvendelse til fuldmægtig Jessie Tvillinggaard eller fuldmægtig Vibeke Schrøder på tlf. 35446200.

**DANNY TRANSPORT**

- tá okkurt
skal koyrast
ella goymast

**Tlf. 319192**

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Ford Escort CLX 1,8 Diesel, 4 hurðar

**Árg.:** 25.10.1994

**KM:** 144.617

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Mogens Petersen, 826 Trongisvági.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

tlf. 37 38 90 • fax nr. 37 31 17
hittist best millum kl. 08.00-10.00

# Aðalfundur

Lýst verður til aðalfund hjá Oyndarfjarðar Ítróttarfelag leygardagin 19. februar kl. 17.00.

Skrá sambært lógum felagsins. Tvey mál verða til viðgerðar.

**Oyndarfjarðar Ítróttarfelag**

**Dansifrøi**



# Rock'n Roll vikuskifti í Havn

**Dansifrøi skipar saman við Niels Kára Nielsen fyri almennum dansiskeiði í Norskum Rock'n Roll vikuskifti 11. & 12. februar**
Undirvíst verður í auluni á Studentaskúlanum í Hoydølum.

Kostnaður: 150 kr. fyri hvønn.

**Tíðirnar verða hesar:**
Bólkur 1: fríggjadag kl. 19-21 og leygardag kl. 14-16
Bólkur 2: fríggjadag kl. 21-23 og leygardag kl. 16-18

Tilmelding: Tlf. 316063 - 316682 - 310634 - 314486 - 317243

**Dansifrøi**

# Seymiáhugaði

Um nóg stór undirtøka er, byrjar seymiskeið í Seymiskríninum mikukvøldið 9.2. frá kl. 19.00-22.00 og hvørt mikukvøld 9 vikur fram.

Áhugaði kunnu ringja á tlf. 31 40 05.

SEYMISKRÍNIÐ
Dr. Jakobsensgøta 16 . Box 320



**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Mentamáladeildin

# Stuðul til Orðabókagerð

Á fíggjarløgtingslógini 2000 eru kr. 400.000 játtaðar til orðabókagerð.

Tey, ið arbeiða við ella ætla at fara undir at gera orðabøkur, eru vælkomin at søkja.

Umsókn við lýsing av verkætlanini, tíðarætlan, fíggjarætlan fyri verkætlanina og fíggjarætlan fyri 2000 verður at senda til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Postrúm 3279 • 110 Tórshavn**
**Telefon 35 50 50 • Telefax 35 50 55**
**e-postur: umms@umms.fo**

Umsøkjarar eiga at upplýsa føðingardag/V-tal og konto nr. í peningastovni, har møguligur stuðul skal gjaldast á.

Umsóknarfreistin er **týsdagin 7. mars 2000**. Tey, ið ynskja at vita meira um stuðulin, eru vælkomin at venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið.

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**

# Sjálvlesandi

## Innskriving til students-/HF-próvtøku

Sjálvlesandi, herundir umgangarar, ið á sumri 2000 ætla sær til students- ella HF-próvtøku, skulu í seinasta lagi 25. februar 2000 innskriva seg til próvtøku við tann skúlan/tað skeiðið, har tey ætla sær til próvtøku. Innskrivingarblað, at fylla út, fæst frá studentaskúlanum og HF-skeiðunum.

Sjálvlesandi skulu rinda 300 kr. fyri hvørja lærugrein, tey innskriva seg til próvtøku í.

Tá ið tann sjálvlesandi hevur verið til próvtøku í ti/teimum lærugrein/um, hann/hon hevur innskrivað seg til próvtøku í, fær hann/hon pengarnar aftur.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið ger vart við, at próvtøkan verður hildin sambært ásetingunum í tí nýggju studentaskúla- og HF-skipanini.

1. februar 2000

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**

# Frá Almannastovuni

Frá 7. til 25. februar hevur pensiónsdeildin telefonavgreiðslu mánadag og fríggjadag. Hinar deildirnar hava opið sum vanligt.

**Almannastovan**